**Semja millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**1.** Sáttmálarnir verða endurnýggjaðir fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2017 til 1. oktober 2019. Fyrsta árið er karmurin 695 kr. um mánaðin og næsta árið er karmurin 754 kr. um mánaðin.

Tann 1. oktober í 2017 hækka mánaðarlønirnar við 633 kr.

Tann 1. oktober í 2018 hækka mánaðarlønirnar við 754 kr.

**2. Umflokkingar**
Landmálsteknikarar og byggitøkningar flyta úr 5. í 6. lønarflokk.

**3. Sáttmálaøki og samráðingarrættur**
Broytt § 1, stk. 4: Fyrsti setningurin "semingsmaðurin leggur uppí" verður broyttur til "Semingsstovnurin leggur uppí". Seinni setningurin verður strikaður.

**4. Álitisfólk**
At leggja afturat § 3, stk. 1. Tá ein verður valdur til álitisfólk, fær ein samsýning svarandi til eitt lønarstig.

**5. Setan**
§ 4 stk. 1 verður broytt soleiðis: Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys í kommununi og alment. Tó er ikki neyðugt at lýsa starv leyst, um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir.

**6. Barnsferð**
Dagføring av § 8:
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
*Stk. 2.* Starvskvinna hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn í 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.
Stk. 3. Prógvar starvskvinna við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinna hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er framvegis 28 vikur.
*Stk. 4.* Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
*Stk. 5.* Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

*Stk. 6.* Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur avgjørt, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki verða í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
*Stk. 7.* Umframt farloyvi nevnt eftir stk. 2 – 6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvisskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðið er samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal verða avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
*Dagføringin av greinini um barsil er galdandi frá tí degi semjan er undirskrivað.*

**7. Eftirlønartrygging**
Dagføring: Orðið” mánaðarløn” verður rættað til “løn”.

**8. Leiðarar**
Broytt stk. 3: Leiðarar, ið eru løntir sambært lønarstiganum á stigunum frá 34 – 40 (deildarleiðari II), og aðrir leiðarar við hægri flokkingum er undantiknir arbeiðssteðgi.

**9. Sløkkiliðsstøðin**
Dagføring av § 20, stk.1: Sløkkiliðsfólk fáa vaktargjald, sum er 18% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1 stig (stig 7).

*Stk. 3.* verður broytt soleiðis, at orðið “skattafrítt” verður strikað.

Sett verður inn nýtt stk. 4, sum er soljóðandi:
Gjaldið fyri mors hækkar við sama % satsi, sum lønirnar hækka við.
Tann 1. okt. 2017 er gjaldið fyri mors: 532,00 kr.
Tann 1. okt. 2018 er gjaldið fyri mors: 545,00 kr.

**10. Arbeiðsbólkar**
§ 21 um arbeiðsbólkar verður broytt soleiðis: Partarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum 2017 – 2019 at kanna almenna lønarlagið bæði sum heild, og hjá einstøkum starvsbólkum. Lýsast skulu møguleikar fyri at skipa eina felags lønarskipan innan tað almenna. Kannast skal um sáttmálarnir og avtalurnar tað almenna/kommunurnar hava við fakfeløg, skapa hóskandi karmar fyri at kunna broyta og endurnýggja almenna/kommunala geiran, soleiðis at hann skynsamt kann røkka sínum endamálum. Arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi í 2018.
Stk. 2. Arbeiðsbólkurin viðv. endurskoðan av lønarbygnaðinum á kommunala sáttmálaøkinum heldur fram.

**11. Serstøk eyka gjøld á SEV**
§ 26, stk. 1: Eykagjaldið fyri at arbeiða úti á spennum yvir firðum verður broytt til 300,00 kr. fyri hvønn dag.
Stk. 2 Eykagjaldið fyri at arbeiða uppi í 60 kV mastrum  verður broytt til 20,00 kr. um tíman.

**12. Tilkallivakt**
At leggja aftrat § 30, stk. 1: Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí at tilkallivaktin tekur við til hon endar.

**13. Sjúka**
Tann 1. januar 2019 verður sett inn í sáttmálan fyri dagrøktarar nýggj áseting um sjúku, sum er soljóðandi:

*Stk. 1.* Verður dagrøktari orsakað av sjúku ikki førur fyri at røkja arbeiði sítt, verður hetta mett sum lóglig orsøk til forfall, uttan so at viðkomandi, sum er í starvi eftir hesum sáttmála, av fyrisettum ráði ella grovum ósketni hevur verið atvoldin til sjúkuna, ella, tá ið hann er settur í starvið, hevur dult sjúkuna.
*Stk. 2.* Fráveru vegna sjúku verður dagrøktari eftir áheitan at vátta skrivliga og við læknaváttan, um tað verður kravt. Varir sjúkan meira enn 2 vikur, kann tað verða kravt, at dagrøktarin útvegar gjøllari upplýsing frá lækna um, hvussu drúgv sjúkan ætlandi verður. Slíka læknaváttan rindar arbeiðsgevarin.
*Stk. 3.* Starvsfólk kunnu fáa frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga. Hava tey meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu tey fáa frí upp til 20 dagar. Somu reglur eru galdandi fyri tímalønt starvsfólk, sett í starv eftir hesum sáttmála. Sí fylgiskjal um avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á kommunalum/interkommunalum arbeiðsplássum, pkt. 4.

**14. Dagføring**
Lønartalvur og sáttmálar (høvuðssáttmálin og dagrøktarsáttmálin) verða dagførdir samsvarandi omanfyristandandi.

*Í Tórshavn tann 22. mars 2018*

**Starvsmannafelagið** **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Avtalur**

1. Partarnir skipa fyri evnisdegi í 2018, at umrøða spurningin, hvussu almennar leiðslur handfara avgerandi broytingar og hvussu starvsfólk fáa høvi at verða við í broytingartilgongdum.

2. Partarnir kanna, hvussu avbjóðingarnar viðv. matarsteðginum hjá klinikkassistum og tannarøktarum í Tórshavnar kommunu kann loysast.

3. Partarnir skipa fyri felags átaki, við tí endamáli at kunna kommunalu- og interkommunalu arbeiðsgevararnar um eftirlønarviðurskiftini hjá starvsfólkum, sum eru limir í Starvsmannafelagnum.